Jú, teir vóru føroyingar. Um eg kundi hitta ein skipara. Jú, sigur ein teirra: “Eg eri skipari.” So sigi eg okkara ørindi. Eg skuldi upp til gentuna, og vit skuldu trúlovast. Hin skuldi so heim til sína føroysku konu. Skiparin svarar aftur, at tað er eingin møguleiki fyri tí: “Tit eru farnir við okkara bestu gentum, so vit fara ikki at hjálpa tykkum at fara eftir teimum!” Tá tyktist einum av hinum synd í okkum, og hann bønaði skiparan um at lova okkum við kortini. Men hetta var sjálvsagt bert skemt. Skiparin var Esmar Fuglø, sum tá førdi Leiv Øssurson, sum var ein trolari á Tvøroyri. Hann var mammubeiggi Jákup Reinert á Sundi. Onkur segði, at vit máttu fara at práta við Olgeirsson, sum var íslendskur konsul, og sum var umboðsmaður fyri skipið í Grimsby. “Nei,” segði Esmar, “hetta er í lagi. Hetta mugu vit gera fyri okkara millumtjóða samskifti”. Vit løgdu at í Aberdeen og koma so til Suðuroyar, har skipið hoyrdi heima. Jóhanna var og tók ímóti mær. Vit rindaðu 4 pund fyri ferðina.

Esmar leigaði ein bát til Havnar, har hann búði, og við tí bátinum fór eisini hin bretin. Hann kundi á tann hátt náa rutubátin til Kvívíkar, so hann kundi sleppa heim til konuna. Annars mátti hann bíða í fleiri dagar. Hann kom eisini heim í øllum góðum eftir at hava verið burtur í 5-6 mánaðir.

Vit bæði fóru norður við Smirli. Vit gistu hjá vinum í Suðuroy og fóru til Havnar dagin eftir.

## Endiliga trúlovað

Tað fyrsta, sum sum var at gera, tá ið vit komu heim, var ein trúloving. Her var tað so heppið, at pápi Jóhonnu var sera vinarliga sinnaður mótvegis bretum. Hann sigldi saman við bretum, og tá ið hann búði í Hollandi vóru eisini nógvir bretar, sum búðu á leiðini, har tey búðu. Teir vóru undir 1. heimsbardaga rýmdir úr Týsklandi til tað uttanveltaða Holland, og teir høvdu búsett seg har.

So eg spurdi pápan, um eg kundi fáa loyvi at trúlovast við dótrini. Tað var so gamaní. Tað kvøldið vit gjørdust trúlovað fóru vit at vitja Giggu hjá Karl í Kaffivogninum. Hetta var um somu tíð, sum tað var fólkaatkvøða um loysing í Føroyum 14. september 1946, og nógv stríð stóðst av úrslitinum.

## Bretland skuldi roynast fyrst

Hesa tíðina var tað sera trupult at búgva í England. Har var trot á mati og øðrum neyðsynjarvørum. Landið var ikki enn komið fyri seg aftaná bardagan. Tí var ein sera hørð skamtan. Tað var eisini trupult hjá útlendingum at sleppa inn í Bretland, uttan so, at teir vóru giftir við bretum.

Pápi Jóhonnu helt tó, at hon skuldi í hvussu er fara at vitja í Bretlandi, áðrenn endaliga avgerðin varð tikin um at flyta hagar, so hon kundi síggja, hvussu hon fór at trívast. Hetta segði hann av royndum, sum áður er greitt frá. Hann flutti við Sannu til Hollands, tá ið tey vóru gift. Men Sanna treivst als ikki. Tað var stórur munur á landslagnum og hon skilti heldur ikki málið. Afturat hesum var maðurin til sjós í mánaðir í senn, so endin gjørdist, at tey fluttu heima aftur. Tað sama skuldi helst ikki henda Honnu.

Tá ið tað var so trupult at koma beinleiðis úr Føroyum til Bretlands, avráddu vit at fara um Noreg. Har komu vit fyrst at búgva eina tíð hjá Nordinu, sum var mostir Jóhonnu.

Eg var nakrar vikur. Jóhanna var har í einar seks mánaðir. Tá fór hon aftur til Føroya, tí at mamma hennara doyði í apríl 1947.

Johanna kom tískil til Aberdeen í august sama ár. Aberdeen var og er jú eisini ein framúr býur.

Tað var so heppið, at tað vóru 30 dagar av sólskini í Bretlandi hesa tíðina, so hon helt seg vera komnan í eitt paradís.



Hanna og Harry sum ungt par




Ferðin heim til Føroyar úr Bretlandi var við Leivur Øssurson

Vit komu til mín heimbý Bury uttanfyri Manchester, og vit ferðaðust runt har á leiðini. Vit fóru eisini til Isle of Man, sum er eitt væl umtókt ferðamannapláss hjá bretum. Vit vitjaðu eisini nógv fólk í Skotlandi.

## Hanna: Skotland var sum eitt himmiríki

Fyrst komu vit til Skotland, og tað var sum eitt himmiríki. Alt stóð sum í einum blóma. Tað var í August 1947 vit komu. Tað var ikki so vanligt við urtagørðum tá. Vit gisti eina nátt í Aberdeen, og tað var myrkt tá. Eg var púra paff, tá eg vaknaði og sá allar hesar blómurnar. Eg hevði arbeitt í Noregi í seks mánaðar. Har var kavi alla tíðina. So kemur mann her og tað blómaði alla staðni.

Men so koma vit hagar, sum Harry var ættaður frá. Tað var langur vegur at fara, og vit komu ikki fram fyrr enn seint um kvøldið. Tá ið eg vaknaði har, var tað nakað heilt annað. Tá vóru vit umringað av verksmiðjum við rúkandi skorsteinum. Hetta virkaði eitt sindur ógvusligt. Men so fóru vit at ferðast aðra staðni, og tá sóu vit mong vøkur støð.

Ikki minst var tað hugaligt úti við strondina, har tað vóru so nógv fólk. Vit sóu nógv av landinum, men vóru tó stutt í hvørjum stað. Tað hevði kanska verið betri at verið í færri støðum, og so heldur longri í hvørjum stað.

Vit komu eisini til Blackpool. Har var eitt so sera høgt torn. Eg segði, at eg vildi sleppa upp har. Systir Harry kom við mær. Har var eitt frálíkt útsýni um allan býin. Seinni fortaldi hon fyri mær, hvussu bangin hon var. Men hon var ikki sum eg von við hæddir. Tey vóru øll sera blíð við meg og gjørdu alt, tey kundu, fyri at eg skuldi kenna meg væl.

Harry tók meg út til ættarfólkini at presentera meg. Eg dugdi




Esmar Fuglø á brúnni á Leivur Øssurson. Esmar gav Harry ein hvøkk við at nokta honum at sleppa við til Føroyar. Men hetta var bert skemt

enskt og skilti tað, tá ið tosað var við meg. Men tað var verri, tá ið tey tosaðu sínámillum. Tað kom so at javna seg. Tað gekk bara gott, og eg longdist ikki. Nógvar gentur, sum fóru úr Føroyum, longdust illa, og mamma var jú sum sagt ein. Pápi longdist heldur ikki heim til Hollands, eftir at hann hevði búsett seg í Føroyum.

Vit fóru tá eisini nakrar dagar út á Man, tað var deiligt. Tað var so gott veður alla tíðina. Har kundi eg eisini svimja á sjónum. Eg plagdi eisini at svimja á sjónum í Føroyum, men tað var munur á, sum tað var kalt har. Eg plagdi at svimja í Vágsbotni. Í eini kapping fekk eg eina ferð aðru premiu. Pápi plagdi eisini at svimja har hvønn dag.

Sum fyrr nevnt var eg komin hendan túrin fyri at síggja, um eg mundi fara at trívast, og hetta metti eg at vera í lagi.

## Tikin við hollendska markið

Eg fór eisini til Holland, har eg ikki hevði verið fyrr. Harry hevði tó verið har saman við skótum sum drongur, og hann hevði tá fingið vinir har. Eg fór at vitja skyldfólk í Hollandi, og fór á ein húsarhaldsskúla í Haag. Harry sigur, at eg gjørdist ein góður kokkur!

Pápi lærdi okkum eitt sindur av hollendskum, men eg lærdi ikki hollendsk til lítar, fyrr enn eg fór hagar, áðrenn eg giftist.

Eg hevði fingið eitt hollendskt pass, ti pápi skifti ongantíð ríkisborgaraskap. Eg var ikki von at ferðast. Tá ið vit koma til passeftirlitið, skulu tey sum eru hollendingar, fara í eina røð og hini í eina aðra. Eg var jú hollendskur borgari, so eg fór